# Roma vil hava Silvestre

Franski verjuspælarin Mikael Silvestre verður ikki longur roknaður sum ein stuðulsspælari í enska felagnum Manchester United, og líkt er til, at Silvestre fer at skifta felag í næstum. Í øllum førum eru fleiri feløg áhuga í at fáa Silvestre á sítt lið. Eitt av feløgunum, sum er ídnast eftir at fáa klørnar í Silvestre, er italska felagið AS Roma.



# Deco avsannar Chelsea

Fjølmiðlar í Spania og Onglandi hava seinastu tíðina skrivað nógv um, at portugisiski miðvallarin Deco skal skifta úr Barcelona til Chelsea at spæla. Róð hevur verið fram undir, at avtalan er gjørd millum partarnar, men tað avsannar høvuðspersónurin sjálvur. - Eg havi ikki skrivað undir nakað við Chelsea, sigur Deco Landsliðsvenjarin hjá Portugal, Luis Felipe Scolari, verður nýggjur venjari í Chelsea eftir summarsteðgin.



landskappingina at gera. Og hóast EB/Streymur í løtuni er sjey stig undan næstu liðunum, so munnu júst sundalagsmenninir vera teir seinastu at kanna sær bitan, áðrenn hann er svølgdur.

Men tá tað er sagt, so er í løtuni ilt at síggja, hvør hevur styrkina at taka oddasessin í landskappingini frá EB/Streymi.

Sambært stigatalvuni, so var talan um ein av argastu FM-kappingarneytunum, sum spælt varð ímóti, og so fær tað illa verið annað enn imponerandi, at EB/Streymur í somikið stóran mun hevði tamarhald á tí, sum gekk fyri seg. Tollið og trygt bíðaði liðið eftir møguleikunum, og tá hesir komu, høvdu teir eisini spælarar, sum megnaðu at taka av.

Ikki minst Arnbjørn T. Hansen, sum støðugt heldur sítt meðal á einum máli fyri dystin.

Og tá hugsað verður um skaðastøðun hjá felagnum, so gerst úrslitið ikki minni imponerandi. Mikkjal Thomassen og Høgni Zachariassen skuldu báðir roknast millum profilarnar á liðnum, men í løtuni fær hvørgin teirra spælt. Og í teirra stað hevur Brian Olsen tikið av møguleikanum á sentrala miðvøllinum, meðan Leif Niclassen og Levi Hanssen roynast drúgvir sum bakkar.

Og tá Sorin Anghel nú eisini hevur prógvað sína styrki sum ein tann sterkasti verjuspælarin í landinum, gerast møguleikararnir av broyta liðið enn størri.

*Tað sigur ikki so lítið um styrkina hjá EB/Streymi, at liðið eisini stendur seg hóast fráveruna av Mikkjal Thomassen og Høgna Zachariassen*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*





*Gjøgnum allan dystin vóru støðugt nógvir tvídystir millum Marna Djurhuus og Karoly Potemkin, sum var størsta álopshóttanin hjá B36*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Skal verða spennandi

Marni Djurhuus var sjálvandi ovurfegin, tá gullið var komið til høldar, og hóast hann ásannaði, at B36 slapp dekan ov væl inn aftur í dystin, so segði hann seg ongan tíð hava kensluna av, at sigurin var í vanda.

- Tað haldi eg ikki. Teir fáa sjálvandi málið til 2-1, og so trýsta teir væl eina løtu. Men tað verður ikki til meira enn tað sama. Vit skora so eisini til 3-1, men eins og við fyrra málið hjá teimum, so eru vit sløsutir í verjuni, soleiðis at teir skora. Men tíbetur gekk tað so kortini at toga sigurin heim.

Og tað er kanska soleiðis, at steypafinalurnar hjá tykkum helst skulu verða eitt sindur spennandi?

- Ja, tað vísir seg. At móti dystarenda skal spenningurin veruliga koma í, segði Marni Djurhuus stórsmílandi.



*Bergur Midjord var vónbrotin, tá leygardagurin endaði við silvurmerkjum til hansara lið*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Silvurið ikki nóg gott

Bergur Midjord hjá B36 var alt annað enn nøgdur, tá hann eftir dystin hevði verið í vestara skýlinum eftir silvurmerkjunum. Heldur ikki hóast tey flestu mundu halda, at dysturin hjá B36 var at kalla av, tá 20 minuttir vóru farnir.

- Tú skuldi kanska trúð, at vit tá vóru lidnir, men tað haldi eg kortini ikki, at vit vóru. Vit fáa eitt mál til 2-1, og so haldi eg, at vit seta stórt trýst á teir undan steðginum.

Eftir steðgin koma tit ongan tíð líka langt niðan at trýsta, sum tit gjørdu tað seinastu løtuna undan steðginum?

- Nei, og eg veit ikki hví. Avtalan var, at vit skuldu halda trýstið, og kanska eisini koma longur niðan, men tað riggaði ikki heilt. Teir standa eisini væl á vøllinum, og tí hava vit trupult við veruliga at koma til nakrar møguleikar.

Og tá dagurin so gjørdist, sum hann gjørdist. Er tað so í lagi at standa við silvurmerkjunum, tá avtornar?

- Nei, tað haldi eg ikki. Eg haldi, at vit spæla ein fínan dyst, og vit skapa eisini tað, sum skal til. Um nakað, so haldi eg, at vit vóru betra liðið á vøllinum, og so er tað ikki í lagi at standa við silvurmerkjum, segði Bergur Midjord.